**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**

# Starvsfólk

Eitt fulltíðarstarv í Heimarøktini og Serforsorgini, innan lønar- og starvsfólkaøki er leyst til setan frá 1. okt. 2006 ella skjótast tilber.

Setanarstaður er Heimarøktin og Serforsorgin, Meginskrivstovan.

**Uppgávurnar sum starvsfólkið kemir at hava um hendi eru:**
- Setanarbrøv til starvsfólk fyri allar deildir innan øki.
- Innplasering sambært sáttmála
- Málsviðgerð í sambandi við lønar- og starvsfólkamál
- Leiðbeina og ráðgeva starvsfólki í sáttmálaspurningum
- Taka lut í arbeiðinum við vaktplanskipanini og arbeiðinum í samband við nýggju lønarskipanina
- Avgreiða lønir til útgjald.
- Ráðgeva leiðsluni í lønar- og starvsfólkamálum og sáttmálaspurningum

**Førleikakrøv:**
- Viðkomandi útbúgving
- Hollar royndir at arbeiða við lønun- og starvsfólkamálum innan almennu fyrisitingina
- Dugir at arbeiða skipað og miðvíst
- Dámar at arbeiða bæði sjálvstøðugt og tvørfakliga
- Góð samstarvsevnir og vera før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum.
- Góðan røkiskap.
- Dugir væl at samskifta bæði skrivliga og munnliga

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt áhugavert og sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri førleikamenning
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt arbeiðsumhvørvi har pláss er fyri látri

**Lønar-og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Tú kanst fáa meira at vita við at venda tær til Sólvør Simonsen ella Ingrid Gregersen, lønardeildina, á telefon 304014 og 304009.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Eirargarður 2, 2 hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Virkandi stjóra, Regin Johansen

**Umsóknarfreist:** 15. august 2006

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður sjúkrakassin stongdur 24. juli.

Opið er aftur mánadagin 28. august 2006.

**Suðuroyar Norðari Sjúkrakassi**

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADEILDIN*

# Pedagogar

## til Bústovnin og Sambýlið á Mýruvegi í Klaksvík

Innan Almanna- og heilsumálaráðið og stovnum undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum og Sambýlinum á Mýrivegi eru tvey pedagogstørv leys at søkja frá 1. septembur 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstørv, og er arbeiðstíðin 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Á Bústovninum og Sambýlinum búgva 4 ung fólk við autismu og 6 vaksin fólk við menningartarni. Endamálið við okkara arbeiði er, at skapa tryggar karmar hjá búfólkunum og skipa fyri virksemi, sum er til gagns fyri hvønn einstakan.

Umráðandi er, at umsøkjarnir eru væl fyri kropsliga og eru áhugaðir í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjararnir hava góð samstarvs- og innlivingarevnir.

Vit bjóða eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum bæði persónliga og fakliga.

**Løn- og setanartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og lønt stigini 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Nærri fæst at vita um størvini frá leiðarnum á telefon 456310.

Um eingir pedagogar søkja størvini, verða størvini sett við hjálparfólki sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Bústovnurin og Sambýlið á Mýruvegi**
Att. Leiðarin
Mýrivegur 13A
700 Klaksvík

**Umsóknarfreist:** 15. august 2006


Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

# Pioner

– hin vælumtókti plastbáturin



- Stoyptur í einum
- Við dupultum skrokki
- Søkkur ikki
- Góðkendur av Norsk Veritas
- Fæst í nógvum modellum
- Vit hava Honda leysamotorar til bátarnar

Sosialurin 341800


## Heimarøktin og Serforsorgin
Heimarøktin

**Heimarøktin í økinum Vágar/Norðstreym søkir eftir starvsfólki til aktivering av eldri á Korndalsbýlinum á Eiði.**

Eitt starv sum ítrivsvegleiðari á setanarbrøki 0,5 í tíðarskeiðnum 1. september 2006 til 31. desember 2006 er leyst at søkja.

Arbeiðstíðin er dagtímar mánadag til fríggjadag.

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum ítrivsvegleiðari, heilsurøktari ella ergoterapeutur.
- Hevur hug og hegni at starvast við eldri fólki og at samstarva við ymiskar fakbólkar
- Kann tilrættaleggja aktivering í mun til tørvin hjá tí einstaka brúkaranum

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrksifelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran á telefon 333249 og 282249.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. verður at senda til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreym**
Økisskrivstovan
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 21. juli 2006.**

TEYMAVIRKIÐ

# Handilslærlingur
## til Teymavirki í Runavík

**Teymavirkið** í Runavík sóknast eftir handilslærlingi at byrja skjótast møguligt. Størsti parturin av fyrsta árinum fer fram í Leikabúðini.

**Vit bjóða** eitt starv á einum fjølbroyttum arbeiðsplássi í støðugari menning, har samstarv við arbeiðsfelagar, veitarar og kundar er av alstórum týdningi.

**Arbeiðstíðin** verður 40 tímar um vikuna og roknast kann við at arbeiða annan hvønn leygardag.

**Vit vænta**, at tú hevur FHS- ella HH-prógv. At tú ert fyrikomandi, arbeiðssamur og fleksibul persónur, sum dugir væl at samstarva, men eisini arbeiða sjálvstøðugt.

**Umsókn** við avriti av prógvum, møguligum ummælum og CV skulu verða Teymavirkinum, Boks 210, 620 Runavík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. juli 2006.

**Meiri** fæst at vita við at venda sær til Maluna Nielsen á tlf. 47 30 21.

Teymavirki í Runavík og Snørisvirki í Klaksvík eru einastu fyri-tøkur í Føroyum, i framlei a línu, teymar og togverk. Bæ i virkini hava skipshandlar, har m.a. arbei sklæ i og trygdarútger er at fáa. Harafturat hevur Teymavirki bún tis- og klæðnadeild. Í alt eru 20 fólk í starvi hjá Teymavirkinum og Snørisvirkinum.